*Fyrsta oljumilliónin í Lopra:*

# Tað skal undra meg, um ikki onkur føroyingur fær hana

*- Vit taka tað tilboðið, sum er tað besta fíggjarliga og í dygd, sigur Arne Rosenkrands Larsen hjá DONG.*

ÁKI BERTHOLDSEN

- Eg úttali meg ikki um einstakar lutir í sambandi við tilboðini.

Men tað skal undra meg, um tað ikki verður onkur av føroyingunum, sum fer við arbeiðnum.

Arne Rosenkrands Larsen á Dansk Olie og Naturgass DONG, sigur, at tað



*- Vit plagdu altíð taka tað tilboðið, sum í prísi og dygd er tað besta. Men hatta við dygdini er sjálvdan ein trupulleiki so passa tølini til hava almannakunngjørt, er lítil ivi um, hvagar vit venda okkum, sigur DONG.*

verður fyrsta dagin, at avgerðin fellur um, hvør fær arbeiðið at bera borplássið í Lopra klárt.

Hann sigur, at hann hevur ikki sæð tilboðini og tað undrar hann, at Sosialurin hevur fingið tølini og kundi almannakunngerða tey fyrsdagin.

*Eitt, sum fólk hava hefti seg við, er tilboðið frá Højgaard & Schultz. Summi halda tað verða í stríð við*

**Framhald á síðu 14**


TILBOÐ

ALT KOSTAR MINNI í BÓNUS

**Jolly Cola**
frá Føroya Bjór
1,5 ltr. fyri
BERT 7.95 + pant

**Lion Bar**
Tak 4 fyri
BERT 9.95

Íslendsk
**Lambs-síða**
Fyri kg.
BERT 15.00

Tórshavn - Glyvrar

BÓNUS... tí allar vørur kosta minni!!!

ALTÍÐ BÍLIGARI


# Summir læknar illir

*Læknar á Landssjúkrahúsinum hótta við tiltøkum, um landsstýrið tekur undir við uppskotinum at loysa læknastjóran frá sínum uppgávur beinanvegin*

Tað dámdi summum læknum á Landssjúkrahúsið lítið, tá teir frættu, at landsstýrismenninir Andreas Petersen og Joannes Eidesgaard í gjár fóru at leggja uppskot fyri landsstýrið um nýggja sjúkrahúslóg.

Tað var ikki so mikið uppskotið um nýggja sjúkrahúslóg, ið kom óvart, men meira tilmæli, sum teir báðir landsstýrismenninir hava gjørt saman við tingmanning javnaðarfloksins.

„Konsulenttænastan sum læknastjóri verður niðurløgd, og verandi læknastjóri verður loystur frá uppgávum sínum beinanvegin.

Sjúkrahússtjórin fær boð um at tryggja arbeiðsfrið í sjúkrahúsverkinum."

Longu gjáramorgunin høvdu nakrir læknar hug at mótmæla, og onkur tosaði eisini fyri at leggja arbeiðið niður.

**Ikki allir**

Men læknarnir á Landssjúkrahúsinum eru ikki so samdir. Har arbeiða eisini læknar, sum eins og deildarsjúkrasystrarnar halda, at tað ber ikki til at arbeiða, sum viðurskiftini eru, og at læknastjórin í hvussu er eigur at fara frá.

Læknarnir løgdu ikki arbeiðið niður í gjár, men tað frættist, at leiðandi yvirlæknin á skurðgongdini skrivaði landsstýrinum bræv í gjár. Í hesum brævi segði hann tað ikki kunna góðtakast, at ein bólkur av starvsfólkum koyrdi læknaligu ekspertisuna frá. Hann boðaði í brævinum eisini frá, at læknarnir fóru at gera mótttiltøk, um læknastjórin varð loystur frá sínum uppgávum.

**Fund allan dagin**

Tað var í gjár ógjørligt at fáa nakra viðmerking frá landsstýrinum, tí teir høvdu fund allan dagin um lógaruppskotini, sum næstu dagarnar skulu leggjast fyri tingið. Uppskot, ið leggjast skulu fram í hesi tingsetuni, skuldi verða løgtingsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi kl. 16 í gjár.

Eitt av hesum lógaruppskotum er uppskotið um nýggja sjúkrahúslóg.

Sambært uppskotinum ásetur landsstýrið nærri reglur um bygnað og fyrisitingarlig viðurskifti fyri Sjúkrahúsverk Føroya.

Uppskotið um bygnaðarbroytingar í meginfyrisitingini fevnir annars eisini um høvuðsleiðsluna av heilsuverkinum.

Tá nýggja sjúkrahúslógin er samtykt, og nýggju bygnaðarbroytingarnar eru gjørdar, tekur landsstýrið endaliga støðu til, hvussu bygnaður og leiðsla í heilsuverkinum skulu síggja út.

Landsstýrið skal í seinasta lagi á ólavsøku í ár hava tikið støðu til hesi viðurskifti.

**randi**


UMVÆLING & SØLA

**Landbúnaðaramboð**

Traktorar
DEUTZ & SAME

Aðrar maskinur
m.a. REFORM, BAUER & GRILLO

Sjálvandi hava vit ella útvega vit allar eykalutir - eisini til SEP-maskinur eins og til EKKO-grastrimmarar

*Skjót & góð tænasta!*

**L.Á.K. tænastan**
Argjaboðagøta - 160 Argir
Tlf. 18151 - 84251 Tlf./heima: 15920 - Fax 18153

